# Kunngerðablaðið A

2013 Givið út 21. mai 2013


Nr. 55 21. mai 2013

**Kunngerð**
**um**
**skipan av fiskiskapinum eftir makreli og norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2013**

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 2, 3, 4 og 7, § 9, stk. 2, § 10, stk. 6, § 32, stk. 1 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum broytt við løgtingslóg nr. 58 frá 2. juni 1995, løgtingslóg nr. 92 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 64 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 84 frá 6. juni 1997 og løgtingslóg nr. 69 frá 18. august 1998, og við heimild í § 6 í løgtingslóg nr. 50 frá 17. mai 2013 um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir norðhavssild og makreli í 2013 verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um skipan av fiskiskapinum eftir makreli og norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2013 og treytir um umskiping, lating og móttøku av veiðu í tí sambandi.

*Heildarkvota og býti av makreli*

**§ 2.** Føroyska heildarkvotan av makreli í 2013 verður sett til 125.852 tons.

**§ 3.** Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2013 fiska 111.052 tons av heildarkvotuni av makreli sbrt. § 2. Harumframt eru 32.743 tons av makreli, sum ikki vórðu fiskað í 2012, flutt til 2013.

*Stk. 2.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 67.000 tons latin fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi, sbrt. § 5, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, at fiska makrel í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum egin árskvota. Umframt kvotuna á 67.000 tons, kemur ikki fiskað kvota frá 2012, sum einstøku fiskiførini eru heimilað at flyta sær til 2013.

*Stk. 3.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 20.000 tons latin øðrum enn teimum í stk. 2 nevndu fiskiførum, sum í 2009 høvdu rætt til fiskiloyvi til uppsjóvarfisk í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki. Hámarkið verður sett eins í tonsum fyri øll fiskifør í bólkinum.

*Stk. 4.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 23.000 tons latin fiskiførum í bólki 2, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og bólki 4T, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki, har hámarkið verður sett soleiðis, at hvørt fiskifar kann í mesta lagi fiska 10% av felagskvotuni.

*Stk. 5.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 2.000 tons latin hesum fiskiførum sum felagskvota at fiska við øðrum reiðskapi enn troli og nót:

1) Fiskifør í bólki 3, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
2) Fiskifør í bólki 4A, bólki 4B og bólki 5, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
3) Fiskifør, sum hava fiskiloyvi sbrt. kunngerð um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum.
4) Fiskifør, sum hava fiskiloyvi til skeljadjór í føroyskum sjógvi, undantikið fiskifør, sum í 2013 hava rætt til fiskiloyvi til rækjur.

*Stk. 6.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 16.500 tons latin eigarum av øðrum fiskiførum undir føroyskum flaggi enn teimum, sum eru fevnd av stk. 2-5. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki, har hámarkið verður sett soleiðis, at hvørt fiskifar kann í mesta lagi fiska 20% av felagskvotuni.

*Stk. 7.* Av kvotuni til fiskifør undir føroyskum flaggi, sbrt. stk. 1, verða 3.502 tons sett av til vísindaligar fiskirannsóknir eftir tilmæli frá Havstovuni. Kvotan verður latin sum egin árskvota sbrt. § 20, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Stk. 8.* Av kvotuni til fiskifør undir føroyskum flaggi, sbrt. stk. 1, verða 5.000 tons sett av til vinnuligar fiskiveiðiroyndir, sbrt. § 6, og at nýta í samráðingum um fiskiveiðirættindi við onnur lond. Kvotan til vinnuligar makrelroyndir verður latin skipum sum felagskvota.

*Stk. 9.* Um líkindi eru fyri, at felagskvotan í stk. 3-6 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin hækka ella taka burtur ásetta hámarkið. Landsstýrismaðurin skal í góðari tíð, og í seinasta lagi 10 dagar áðrenn, boða frá avgerð um broytingar.

*Stk. 10.* Um kvoturnar í stk. 3-6 ikki eru fullnýttar tann 1. september 2013, verður loyvt fiskiførum við loyvi sbrt. stk. 3-6 at fiska av hesum kvotum.

*Stk. 11.* Um líkindi eru fyri, at felagskvotan í stk. 3-6 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin loyva fiskiførum við loyvi sbrt. stk. 2 at fiska av hesum kvotum. Landsstýrismaðurin skal í góðari tíð, og í seinasta lagi 10 dagar áðrenn, boða frá avgerð um broytingar.

*Stk. 12.* Um kvoturnar, sbrt. stk. 7-8, ikki eru latnar, ella líkindi eru fyri, at latnar kvotur ikki verða fiskaðar, kann landsstýrismaðurin loyva fiskiførum við loyvi sbrt. stk. 2-6 at fiska av hesum kvotum, ella nýta kvotuna til vísindaligar fiskirannsóknir.

*Heildarkvota og býti av norðhavssild*

**§ 4.** Føroyska heildarkvotan av norðhavssild í 2013 verður sett til 105.230 tons.

**§ 5.** Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2013 fiska 103.180 tons av norðhavssild av heildarkvotuni sbrt. § 4.

*Stk. 2.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 60.000 tons latin fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2012 høvdu rætt til fiskiloyvi, sbrt. § 5, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, at fiska eginkvotu av norðhavssild í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum egin árskvota. Umframt kvotuna á 60.000 tons kemur ikki fiskað kvota frá 2012, sum einstøku fiskiførini eru heimilað at flyta sær til 2013. Hevur fiskifarið fiskað ov nógv av tillutaðu kvotuni fyri 2012, verður ov nógva veiðan mótroknað kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2013.

*Stk. 3.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 13.000 tons latin øðrum enn teimum í stk. 2 nevndu fiskiførum, sum í 2012 høvdu rætt til fiskiloyvi til beinleiðis veiðu eftir norðhavssild í føroyskum sjógvi. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki. Hámarkið fyri hvørt fiskifar verður sett eftir, hvussu nógv veiðiloyvi eru løgd saman á fiskifarið.

*Stk. 4.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 13.500 tons latin fiskiførum í bólki 2, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og bólki 4T, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki, har hámarkið verður sett soleiðis, at hvørt fiskifar kann í mesta lagi fiska 10% av felagskvotuni.

*Stk. 5.* Av kvotuni, sbrt. stk. 1, verða 1.180 tons latin hesum fiskiførum sum felagskvota at fiska við øðrum reiðskapi enn troli og nót:

1) Fiskifør í bólki 3, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
2) Fiskifør í bólki 4A, bólki 4B og bólki 5, sbrt. § 29, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.
3) Fiskifør, sum hava fiskiloyvi sbrt. kunngerð um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum.
4) Fiskiføri, sum hava fiskiloyvi til skeljadjór í føroyskum sjógvi, undantikið fiskiføri, sum í 2013 hava rætt til fiskiloyvi til rækjur.

*Stk. 6.* Av kvotuni, sbrt. stk.1, verða 12.500 tons latin eigarum av øðrum fiskiførum undir føroyskum flaggi enn teimum, sum eru fevnd av stk. 2-5. Kvotan verður latin sum felagskvota við hámarki, har hámarkið verður sett soleiðis, at hvørt fiskifar kann í mesta lagi fiska 20% av felagskvotuni.

*Stk. 7.* Av kvotuni til fiskiføri undir føroyskum flaggi, sbrt. stk. 1, verða 1.000 tons sett av til vísindaligar fiskirannsóknir eftir tilmæli frá Havstovuni. Kvotan verður latin sum egin árskvota sbrt. § 20, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Stk. 8.* Av kvotuni til fiskiføri undir føroyskum flaggi, sbrt. stk. 1, verða 2.000 tons sett av til vinnuligar fiskiveiðiroyndir, sbrt. § 6. Kvotan verður latin skipum sum felagskvota.

*Stk. 9.* Um líkindi eru fyri, at felagskvotan í stk. 3-6 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin hækka ella taka burtur ásetta hámarkið. Landsstýrismaðurin skal í góðari tíð, og í seinasta lagi 10 dagar áðrenn, boða frá avgerð um broytingar.

*Stk. 10.* Um líkindi eru fyri, at felagskvotan í stk. 3-6 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin loyva fiskiførum við loyvi sbrt. stk. 2-6 at fiska av hesum kvotum. Landsstýrismaðurin skal í góðari tíð, og í seinasta lagi 10 dagar áðrenn, boða frá avgerð um broytingar.

*Stk. 11.* Um kvoturnar, sbrt. stk. 7-8, ikki eru latnar, ella líkindi eru fyri, at latnar kvotur ikki verða fiskaðar, kann landsstýrismaðurin loyva fiskiførum við loyvi sbrt. stk. 2-6 at fiska av hesum kvotum.

*Vinnuligar fiskiveiðiroyndir*

**§ 6.** Fiskiføri undir føroyskum flaggi, sum ætla at fáa lut í kvotu, ið er sett av til vinnuligar fiskiveiðiroyndir sbrt. § 4, stk. 8 ella § 5, stk. 8, skulu skrivliga søkja Fiskimálaráðið um hetta. Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi innan 10.6.2013 kl. 12.00. Umsóknin skal lýsa endamál, tíðarætlan og kostnaðarætlan fyri royndirnar, umframt upplýsingar um reiðskap, útgerð og leiðir.

*Stk. 2.* Fiskimálaráðið skal senda umsóknir, ið lúka formligu krøvini í stk. 1, til Havstovuna ella onnur serkøn innan økið, sum gera ummæli til Fiskimálaráðið.

*Stk. 3.* Í viðgerðini og ummælum av umsóknum skal dentur serliga leggjast á menningar- og nýskapanarvirði í royndunum, umframt virðisøking av veiðuni.

*Umrokningarfaktorar*

**§ 7.** Við umrokning av fiski og fiskavørum til runda vekt í sambandi við avgjøld, sbrt. løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir norðhavssild og makreli í 2013, skulu hesir umrokningarfaktorar nýtast fyri makrel og norðhavssild:

| | *Makrelur* | *Norð-havssild* |
|---|---|---|
| Kruvt, við høvdi | 1,15 | 1,00 |
| Kruvt, avhøvdaður | 1,30 | 1,00 |
| Flak við skræðu og beini | 2,60 | 2,00 |
| Flak, uttan skræðu, við beini | 2,60 | 2,00 |
| Flak uttan skræðu og bein | 2,60 | 2,00 |
| Fiskamjøl | 5,22 | 5,22 |

*Fiskiloyvi*

**§ 8.** Fiskiskapur eftir makreli ella norðhavssild kann bert fara fram við fiskiførum, sum eftir umsókn hava fingið fiskiloyvi frá Fiskimálaráðnum til slíkan fiskiskap.

*Stk. 2.* Bert persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðiloyvi, kunnu fáa fiskiloyvi sbrt. hesi kunngerð. Fyri fiskifør, ið koma undir bólk 5, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, krevst tó ikki veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi sbrt. hesi kunngerð.

*Umskiping o.a.*

**§ 9.** Sbrt. § 10, stk. 3, 5 og 6 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap er bert loyvt fiskiførum, og øðrum førum undir føroyskum ella fremmandum flaggi, at umskipa, lata og taka ímóti veiðu, sum er fiskað sambært hesi kunngerð eftir umsókn og við loyvi frá Fiskimálaráðnum.

*Stk. 2.* Umskiping frá skipum, sum taka ímóti og frysta makrel ella norðhavssild, kann bert fara fram við bryggju í føroyskari havn og við loyvi frá Fiskiveiðieftirlitinum. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum gera undantak frá hesum kravi treytað av, at eftirlitið í sambandi við umskiping verður mett nøktandi.

*Stk. 3.* Fiskiveiðieftirlitið kann áleggja skipum, sum taka ímóti og frysta makrel ella norðhavssild, at koma í føroyska havn til eftirlit, áðrenn tey fara úr føroyskum sjógvi.

*Stk. 4.* Treytað av, at eftirlitið verður mett nøktandi, kann Fiskiveiðieftirlitið eftir umsókn geva skipum, sum taka ímóti veiðu frá øðrum og flyta veiðuna til innvigingarstað, undantak frá kravinum um at hava góðkenda innvigingarskipan sambært kunngerð um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.

*Partroling og samtroling*

**§ 10.** Áðrenn fiskifar byrjar at partrola ella samtrola saman við øðrum fiskifari ella fiskiførum, skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum um, hvørjum trolað verður saman við. Eisini skal fráboðan sendast Fiskiveiðieftirlitinum, tá partrolingin ella samtrolingin, saman við fráboðaða fiskifarinum ella fiskiførunum, endar.

*Stk. 2.* Tað er bert loyvt at skifta makkara, eftir at fráboðan er send Fiskiveiðieftirlitinum um veiðu flokkað á fiskaslag. Fiskifør, sum hava veiðu umborð, sum ikki er farin um eina góðkenda innvigingarskipan, kunnu ikki skifta makkara, fyrr enn veiðan er farin um eina góðkenda innvigingarskipan, sambært kunngerð um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.

*Stk. 3.* Tá fiskifør trola saman, verður veiðan, sum er fingin undir partrolingini ella samtrolingini, skrásett javnt býtt millum fiskiførini, sum hava partrolað ella samtrolað.

*Stk. 4.* Tá ábyrgdarfólk á innvigingarskipanum senda Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingar um landingar, sbrt. kunngerð um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum, skulu tey skráseta hvørt fiskaslag sær javnt býtt millum fiskiførini, sum hava verið við í partrolingini ella samtrolingini, og senda Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingarnar fyri fiskiførini hvør sær.

*Stk. 5.* Skiparin á farinum, sum landar veiðuna, hevur skyldu til at upplýsa ábyrgdarfólki á innvigingarskipanum, hvørji fiskifør hava verið við í partrolingini ella samtrolingini.

*Hjáveiða*

**§ 11.** Hjá fiskiførum, sum hava loyvi at fiska uppsjóvarfisk, sum er undir kvotuskipan, er hjáveiða av hesum fiskasløgum loyvd í beinleiðis fiskiskapi eftir makreli ella norðhavssild. Hjáveiðan verður roknað av eginkvotuni hjá viðkomandi fiskifari ella av felagskvotuni hjá viðkomandi fiskiførum.

*Stk. 2.* Hjá fiskiførum, sbrt. stk. 1, har kvota av uppsjóvarfiski er uppfiskað, og hjá fiskiførum, sum ikki eru fevnd av stk. 1, kann hjáveiða av uppsjóvarfiski, sum er undir kvotuskipan, í mesta lagi vera 10% av samlaðu vektini fyri hvørja avreiðing, lating, uppskiping ella umskiping.

*Stk. 3.* Hjá fiskiførum, sum eru fevnd av stk. 2, og sum lata hvørt hál til móttøkuskip ella til flutningsskip á feltinum, verður hjáveiðan, sbrt. stk. 2, roknað av í mesta lagi 5 fylgjandi hálum.

*Stk. 4.* Hjá fiskiførum, sum eru fevnd av stk. 2, og sum framleiða ella frysta veiðuna umborð, kann hjáveiðan, hóast ásetingina í stk. 2, tó ongantíð vera meir enn 10% av samlaðu vektini av veiðuni fyri eitt tíðarskeið upp á 5 døgn.

*Stk. 5.* Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblanding av øðrum uppsjóvarfiski, sum er undir kvotuskipan, er størri enn 10% av samlaðu vektini av veiðuni í hvørjum háli.

**§ 12.** Samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur má hvørki fyri hvørt hál ella fyri túrin vera meiri enn 2% av samlaðu veiðuni fyri túrin ella hálið.

*Stk. 2.* Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblandingin av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur er størri enn 2% av vektini í hvørjum háli ella kasti.

**§ 13.** Fiskiveiðieftirlitið kann, við heimild í § 35, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, áseta bráðfeingis veiðibann, har hjáveiðan er meira enn ásetta hámarkið sbrt. §§ 11 ella 12.

*Undirmátsfiskur*

**§ 14.** Veiðan av undirmátsmakreli má ikki vera meira enn 10% av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin. Veiðan av undirmátssild má ikki vera meiri enn 5% av samlaðu vektini av veiðuni fyri túrin.

*Stk. 2.* Makrelur, ið er undir 30 cm, mátaður fremst úr høvdinum til aftast á stertinum, tá hann er strektur, er undirmátsmakrelur.

*Stk. 3.* Norðhavssild, ið er undir 22 cm, mátað fremst úr høvdinum til aftast á stertinum, tá hon er strekt, er undirmátssild.

*Meskar í uppsjóvartroli*

**§ 15.** Tá makrelur og norðhavssild verða veidd við uppsjóvartroli, mugu meskarnir ikki fara niður um 35 mm.

*Gørn*

**§ 16.** Beinleiðis veiða eftir makreli og norðhavssild við gørnum er ikki loyvd innan fyri linjur drignar millum hesi støð:

1) 62°24´7090 N 006°33´3655 V
2) 62°22´7108 N 006°17´1607 V
3) 62°21´5780 N 006°12´9309 V
4) 62°20´6219 N 006°11´8598 V
5) 62°16´4800 N 006°13´9060 V
6) 62°13´7883 N 006°16´6000 V
7) 62°11´2594 N 006°21´5132 V
8) 62°07´2027 N 006°31´4429 V
9) 61°58´5259 N 006°35´0994 V
10) 61°37´8020 N 006°38´5500 V
11) 61°28´2366 N 006°38´3683 V
12) 61°24´9380 N 006°34´0792 V
13) 61°24´9380 N 006°34´0792 V
14) 61°21´6976 N 006°44´9684 V
15) 61°23´9291 N 006°51´6311 V
16) 61°28´7341 N 006°57´2607 V
17) 61°37´3000 N 007°03´6000 V
18) 61°46´0000 N 006°54´4180 V
19) 61°54´7500 N 007°00´9000 V
20) 61°59´2200 N 007°03´5000 V
21) 61°59´7498 N 007°14´5000 V
22) 62°04´5000 N 007°43´5000 V
23) 62°05´5000 N 007°44´7766 V
24) 62°06´3000 N 007°44´5005 V
25) 62°06´8998 N 007°43´7879 V
26) 62°08´3500 N 007°39´5000 V
27) 62°10´2000 N 007°28´0000 V
28) 62°15´6000 N 007°17´6600 V
29) 62°19´1298 N 007°13´6356 V
30) 62°22´7411 N 006°50´4492 V
31) 62°24´7090 N 006°33´3655 V

*Stk. 2.* Veiðibannið í stk. 1 fevnir ikki um royndir, sum Havstovan skipar fyri, og fiskifør, sum hava fingið royndarloyvi frá Fiskimálaráðnum.

*Útblaking*

**§ 17.** Tað er ikki loyvt at blaka ella sleppa fiski útaftur.

*Ymiskar ásetingar um útgerð umborð*

**§ 18.** Gloppið millum rimarnar í pumpukassanum kann í mesta lagi vera 10 mm. Rimarnar skulu vera sveisaðar fastar. Um pumpukassin hevur hol í staðin fyri rimar, skal tvørmátið á holunum ikki fara upp um 10 mm. Hol í sliskuni, áðrenn pumpukassan, mugu ikki vera meira enn 15 mm í tvørmát.

**§ 19.** Skip mugu ikki vera innrættað soleiðis, at møguligt er at tøma fisk úr tangunum fyri borð undir vatnganginum. Harafturat er ikki loyvt at hava skipanir umborð, har gjørligt er at mala heilan fisk og fiskaúrdrátt og síðani spræna yvir borð.

**§ 20.** Fiskiveiðieftirlitið kann krevja at fáa tekningar frá skipum, sum vísa, hvussu fongurin verður hagreiddur umborð og um tømingarmøguleikar. Skip skulu til eina og hvørja tíð hava avrit av hesum tekningum.

**§ 21.** Fiskifør, sum ikki frysta veiðuna umborð, hava ikki loyvi at hava ella brúka sjálvvirkandi støddarskiljarar umborð. Um veiðan verður fryst ella virkað umborð, skal hetta gerast beint eftir støddarskiljing.

*Eygleiðari*

**§ 22.** Sbrt. § 36, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann landsstýrismaðurin krevja, at eygleiðari er umborð á fiskiførum og førum, sum umskipa, taka ímóti frá øðrum fari ella lata øðrum fari veiðu ella úrdrátt úr veiðu. Fiskiveiðieftirlitið ger av, um eygleiðari skal vera umborð á fiskiførum, ið fiska sambært hesi kunngerð og førum, sum umskipa, taka ímóti frá øðrum fari ella lata øðrum fari veiðu ella úrdrátt úr veiðu. Útreiðslur til løn, kost og uppihald hjá eygleiðara ber farið. Eygleiðarar hava loyvi at nýta samskiftisútgerðina umborð til tess at hava samband við Fiskiveiðieftirlitið og við aðrar myndugleikar.

*Sýni*

**§ 23.** Fiskifør, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at taka sýni av veiðuni.

**§ 24.** Fiskifør, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at gera kanningar av veiðuni, herundir av stødd, vekt og dygd.

*Revsing*

**§ 25.** Brot á § 8, stk. 1, § 10, stk. 1, 2, 4 ella 5, § 11, stk. 2–5, § 12, § 14, stk. 1, § 15, § 16, stk. 1, §§ 17–19, § 20, 2. pkt. ella § 21 verða revsað við bót, um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki fylgir boðum sbrt. § 9, stk. 3, §§ 23 ella 24, ella umskipar o.a. uttan loyvi, sbrt. § 9, stk. 1 ella stk. 2. Um brot er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt, sbrt. § 40, stk. 3 í

løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, verða revsað við bót.

*Stk. 2.* Sbrt. § 45 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann Fiskiveiðieftirlitið beinanvegin taka inn fiskiloyvi, um skipari á fiskifari er skuldsettur fyri brot á hesa kunngerð, ella um fiskifarið ikki hevur hildið seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum sambært hesi kunngerð. Fiskiloyvi kann verða tikið aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildistíð*

**§ 26.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2013.

Fiskimálaráðið, 21. mai 2013

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)